| |
|---|
| **LÝSING AV ÚTBÚGVING**<br>**Hjánám í Samfelagsvísindum**<br>*Subsidiary Subject Studies in Social Science* |
| |

| | |
|---|---|
| SLAG AV ÚTBÚGVING OG ÁRAMÁL | Samfelagsvísindalig útbúgving, 1½ ár (90 ECTS) |
| ÚTBÚGVINGARSTOVNUR/-AR | Fróðskaparsetur Føroya, Søgu- og Samfelagsdeildin.<br>*University of the Faroe Islands, Faculty of History and Social Sciences.* |
| STOVNUR, IÐ GÓÐKENNIR ÚTBÚGVINGAR | Uttanríkis- og mentamálaráðið (UMMR)<br>*Ministry of Foreign Affairs and Culture.* |
| TÍÐARBIL, VÍST VERÐUR TIL | Útbúgvingin er galdandi frá á heysti 2020. |
| STIG | Bachelor: 1st Cycle sambært QF-EHEA og stig 6 sambært EQF-LLL. |

| A | ENDAMÁL |
|---|---|
| | Endamálið við útbúgvingini er m.a. at útbúgva tey lesandi í at vera lærarar í miðnámsskúlum. Hjánám í samfelagsfrøði gevur teimum lesandi fjølbroytta vitan um og innlit í føroysk og altjóða samfelagsviðurskifti og samfelagsvísindalig háttaløg. Málið er at geva lesandi førleika til at arbeiða sjálvstøðugt og tvørvísindaliga við fjøltáttaðum samfelagsvísindaligum uppgávum í samfelagnum. |

| B | EYÐKENNI | |
|---|---|---|
| 1 | GREIN(AR) / EVNISØKI | Útbúgvingin hevur ein tvørfakligan profil, har høvuðsøkini sosiologi, antropologi, stjórnmálafrøði (íroknað altjóða politikkur) og búskaparfrøði verða lýst og brúkt í mun til spurningar um t.d. fólkaræði og vælferð, sosialar og mentanarligar broytingar, globalisering og samleiki. Kravdu skeiðini eru:<br>▪ Sosiologi og antropologi (ella háttalag I) 17%<br>▪ Stjórnmálafrøði 17%<br>▪ Vísindaástøði og háttalag (ella sosialvísindi ella samfelagsplanlegging) 17%<br>▪ Búskapur og samfelag 17%<br>▪ Samfelagsástøði 17%<br>▪ Altjóða politikkur 17% |
| 2 | ALMENNUR / SERLIGUR DENTUR | Almennur dentur er lagdur á at arbeiða við tvørvísindaligar, trupulleikagrundaðar og sjálvvaldar verkætlanir, sum kanna praktisk nútíðar samfelagsviðurskifti.<br>Serligur dentur er lagdur á at arbeiða við samfelagsvísindi – ástøðiliga og háttalagsliga – við serligu lokalu viðurskiftunum í Føroyum í huga. |
| 3 | KÓS | Akademisk samfelagsvísindalig útbúgving, sum byggir brúgv millum vísindalig ástøði og praksis, millum gransking og samfelagsmenning. Hjánámið viðger tann týdning, ið mentanarlig, búskaparlig og tøknilig menning hevur á samfelagsgongdina. |
| 4 | SERLIG EYÐKENNI | Hjánámið inniheldur seks kravd skeið, sum tilsamans telja 60 ECTS. Restin, 30 ECTS, verða savnað saman sum valfrí skeið á master-stigi innan samfelagsvísindi. |

| | | |
|---|---|---|
| | | Hjánámið verður sostatt altíð knýtt at einum høvuðsnámi innan samfelagsvísindi. Hjánámið hyggur bæði at altjóða og føroyskum viðurskiftum og small-scale societies. |

| C | STARVSMØGULEIKAR OG FRAMHALDSÚTBÚGVING | |
|---|---|---|
| 1 | STARVSMØGULEIKAR | Hjánám í samfelagsvísindum gevur møguleika til at undirvísa í miðnámsskúlum. Saman við høvuðsnámi innan samfelagsvísindi, gevur útbúgvingin atgongd til størv innan almenna og privata sektorin, eitt nú planlegging og ráðgeving á lokalum/kommunalum og landsstigi, stýring og samskipan av sosialum arbeiði, vælferðartænastum og privatum verkætlanum. |
| 2 | FRAMHALDSÚTBÚGVING | Saman við høvuðsnámi innan samfelagsvísindi, gevur lokið hjánám atgongd til viðkomandi útbúgvingar á master-stigi (second cycle programmes), men eisini til ávísar aðrar masterútbúgvingar, sum ikki eru samfelagsvísindaligar. |

| D | ÚTBÚGVINGARHÁTTUR | |
|---|---|---|
| 1 | ARBEIÐSLAG Í SAMBANDI VIÐ LÆRU- OG UNDIRVÍSING | Trupulleikagrundað (PBL) verkætlanararbeiði, sjálvlestur, lesibólkar, fyrilestrar, stovnsvitjanir, seminar og verkstovur. Dentur verður lagdur á at hava lesandi, ið eru virknir luttakarar í kjakbólkum, framløgum og øðrum formum fyri samvirknari læring. |
| 2 | PRÓVTØKUHÆTTIR | Metingarhættir: Skrivligar og munnligar (einsæris og í bólki) próvtøkur, verkætlanir, framløgur, v.m. |

| E | ÚTBÚGVINGARFØRLEIKAR |
|---|---|
| 1 | ALMENNIR FØRLEIKAR |
| | **Kritiskir førleikar**: megna at hugsa og arbeiða vísindaliga, at orða neyvar trupulleikaorðingar, at greiða og greina data/tilfar og at koma til eina niðurstøðu.<br>**Skrivligt og munnligt samskifti**: megna at orða seg greitt og logiskt, bæði á skrift og í talu, bæði í óformligum og formligum høpi, og at luttaka í samskifti við onnur fak- og leikfólk og at bera fram kritiskar hugsanir, sjónarmið og úrslit á greiðan og sannførandi hátt.<br>**Førleiki at arbeiða sjálvstøðugt og at seta verkætlanir í gongd:** duga at planleggja og samskipa sítt vísindaliga arbeiði við lestrarførleika og fróðskaparhegni á høgum støði, soleiðis at tú sjálvstøðugt megnar at styrkja tína vitan og at menna tínar førleikar.<br>**Altjóða samstarv:** megna at arbeiða í toymum, sum eru tvørfaklig og altjóða, og at geva eitt fakligt íkast til altjóða faklig orðaskifti. |
| 2 | FAKLIGIR FØRLEIKAR |
| | **Grundleggjandi faklig vitan**: megna at ogna sær gott innlit í samfelagsvísindalig evni, hugtøk og ástøðilig rák í einum faksøguligum konteksti og eina holla fatan av ástøðum og arbeiðshættum innan samfelagsvísindaliga fakøkið.<br>**Nágreinilig faklig vitan**: duga at ogna sær vitan um sosiologi, antropologi, stjórnmálafrøði, búskaparfrøði og lógfrøði, og at arbeiða tvørfakliga við evnum sum vælferðarsamfelag, fólkaræði, globalisering, modernisering, mentan, stættir, kyn, miðlar, minnilutar, osfr., í granskingarverkætlanum og samfelagsuppgávum.<br>**Vitan um føroyska samfelagið**: megna at lýsa og greina føroyska samfelagið og mentanina í søguligum og nútíðar høpi, og at kanna og granska samfelagsbroytingarnar og samspælið millum privatar og almennar stovnar. |

| | |
|---|---|
| | **Førleiki at savna inn tilfar**: duga at arbeiða við samfelagsvísindaligum háttaløgum og at savna inn data/tilfar á ein vísindaetiskan og vísindaástøðiliga forsvarligan hátt, og at viðgera og greina tilfarið á vælgrundaðan hátt. |

| F | FULLFÍGGJAÐUR LISTI VIÐ LÆRUÚRTØKUNI FRÁ ÚTBÚGVINGINI |
|---|---|
| | Eftir lokna útbúgving er tann lesandi før/ur fyri at:<br>• greiða frá, greina og brúka sína vitan um týðandi ástøði innan samfelagsvísindi.<br>• greiða frá, greina og brúka sína vitan um háttaløg innan gransking av vælferðarsamfeløgum og sosialum viðurskiftum.<br>• skipa, diskutera og miðla vitan um samfelagsvísindalig viðurskifti.<br>• skipa, diskutera og miðla vitan um planleggingarviðurskifti.<br>• brúka ymisk arbeiðs- og greiningaramboð innan samfelagssektorar.<br>• brúka útvald reiðskapsfak, herundir skilja teirra funksjón og leiklut innan samfelagssektorar.<br>• miðla ástøði, háttalag, analysu og úrslit á ein vísindaligan hátt.<br>• grundgeva fyri vali av ástøði og háttalagi í eini verkætlan, umframt at seta fram eina greiða ætlan fyri gjøgnumføring og design av verkætlan.<br>• duga sjálvstøðuga datainnsavnan og at nýta ástøðiliga/háttalags vitan í praktiskari nýtslu innan sosialsektorin.<br>• greina kritiskt globaliseringsdiskursir í ljósinum av samfelagsvísindaligari gransking.<br>• brúka útvald hugtøk, ástøði og háttaløg til at arbeiða við egnari verkætlan, t.v.s. at prógva sín førleika til at taka kvalifiseraðar og kritiskar avgerðir viðvíkjandi ástøði og háttalagi í mun til trupulleikaorðing.<br>• skipa eitt egið arbeiði og tess úrslit í eina samanhangandi og væl skipaða verkætlanarfrágreiðing, og frá hesum grundarlagi at draga fram viðkomandi og grundaðar niðurstøður og perspektiveringar. |